# Eitt dukkuheim

## Henrik Ibsen, 1879

https://nam.mitcfu.fo/CFUFH1690000217



*Mynd frá leikuppseting á Kongliga teatrinum í Keypmannahavn í 1880'unum*

**Lýsing:**

Nora og Thorvald hava eitt gott heim. Hon er hansara lítli sangfuglur, sum er um hann, tá ið hann kemur heim. Thorvald fær betri starv og hægri løn, men so spyrst, at Nora nøkur ár frammanundan hevur skrivað ein rangan veksil, so at maðurin skuldi fáa ráð at fara suðureftir at leita sær heilsubót. Nora heldur seg hava gjørt tað rætta, men Thorvald øtast, og heldur hana vera ein lógarbrótara, ið ikki kann uppala hansara børn. Nora sær veikleika hansara, og fer frá honum.

Ein leikur um viðurskifti, ið vóru so nógv øðrvísi viðvíkjandi kynsbýti og foreldarættindum enn nú á døgum, men sum tó framvegis stendst stríð av.

**Lærugrein og stig:**

Føroyskt á A-stigi. Við smáum tillagingum kann tilfarið eisini brúkast á C-stigi og í hádeild fólkaskúlans.

**Faklig øki**

Við hesum tilfarinum kunnu næmingarnir menna førleikarnar at greina og tulka film og at seta í frásjón. Somuleiðis menna tey førleikarnar at skriva og at skapa margháttaðan tekst.

© Nám 2023
Sólvá Jónsdóttir, námsráðgevi

**Tilfar:**

Arbeitt verður við leikritinum *Eitt dukkuheim* (uml. 60 ns).[1] Harafturat eru leinki til eru leinki til annað tilfar í sBókarøðini *Sýni & Dýpi* og á ymsum heimasíðum.

**Arbeiðshættir:**

Floksundirvísing og bólkaarbeiði. Arbeiðið er skipað í tríggjar partar: ÁÐRENN tey lesa verkið, MEÐAN tey lesa verkið, og AFTANÁ at tey hava lisið verkið.

ÁÐRENN: Arbeiði við ymsum bakstøðistilfari í bólkum.

MEÐAN: Verkið verður lisið og síðani viðgjørt í bólkum.

AFTANÁ: Verkið verður sett í frásjón, og næmingarnir skriva hvør sær eina tíðargrein.

**Tíð:**

6-7 blokkar á 90 min.

---

## Arbeiðsuppgávur:

**ÁÐRENN (1- 2 blokkar)**

**Fyrireiking heima:**

Skipið tykkum í fýra bólkar, og lesið tilfarið, sum tykkara bólkur skal arbeiða við.

Tit skulu í bólkum arbeiða við bakgrundstilfari, sum tit skulu leggja fram fyri flokkinum. Framløgutilfarið (PowerPoint, video, Padlet ella annað) skal verða tøkt hjá øllum at brúka aftur í viðgerðini av leikinum *Eitt dukkuheim*.

1. Um *nýbrotið í norðurlendskum bókmentum*. Tilfar: "Heimspeki, hugmyndafrøði og vísindi" og "Brandes og norðurlendskir rithøvundar" í *Sýni & Dýpi 3*.
2. Um leikritaskaldskap. Tilfar: "Leikritaskaldskapur" í *Sýni & Dýpi 1*.
3. Um Henrik Ibsen. Tilfar: Zakarias Wang: "Inngangur" í útgávuni *Eitt dukkuheim* (1978) og/ella Wikipedia.
4. Um *Eitt dukkuheim*. Tilfar: Store norske leksikon, *Tre versjoner af Et Dukkehjem* og/ella Wikipedia.

---

[1]Leikritið *Eitt dukkuheim* er útkomið í tveimum ymiskum føroyskum týðingum. Týðingin eftir Zakarias Wang (1978) er útseld, men er tøk sum flokssett í Námi. Týðingin eftir Jens Paula Heinesen (1984) fæst til keyps í bókhandlunum. Leikurin er eisini tøkur sum sjónvarpsleikur í fleiri ymsum útgávum:

- NRK (1973)
- DR (1974)
- DR (2002)
- SVT (2023)

© Nám 2023

**MEÐAN (1. blokkur)**

Tit byrja at lesa leikritið í flokkinum, og síðani lesa tit restina hvør sær heima. Í flokkinum kunnu tit antin lesa hvør sær ella saman í smáum bólkum. Meðan tit lesa, skulu tit skugga ella leggja serligt merki til ávísan persón ella viðurskifti. Skrivið stikkorð og finnið nøkur áhugaverd sitat.

Persónar/viðurskifti at skugga:

- Nora
- Helmer
- Frú Linde
- Krogstad
- Rank
- Samfelagsviðurskifti (fíggjarlig og sosial viðurskifti, lógarverk o.a.)
- Kynsleiklutir og familjuviðurskifti.

---

**MEÐAN (2-3 blokkar)**

**Fyrireiking heima:**

Skipið tykkum í seks bólkar, og havið tykkara bólkauppgávu í huga, meðan tit lesa leikritið liðugt.

Bólkaarbeiði. Hvør bólkur arbeiðir við eini av uppgávunum niðanfyri og leggur fram fyri restini av flokkinum. Í framløguni skal hvør bólkur eisini hava okkurt óvæntað við, t.d. eina lítla framførslu, eitt poddvarp ella eina plakat. Framløgutilfarið skal verða tøkt hjá øllum næmingunum.

Uppgávurnar eru ymiskar í vavi. Fyri at allir næmingarnir skulu fáa hóskandi avbjóðing, ber sjálvandi til at tillaga uppgávurnar eftir bólkunum við t.d. at leggja summar av uppgávunum saman, koyra aðrar í tvey ella leggja okkurt afturat ella burturúr.

**Uppgáva 1) Leiklistarlig eyðkenni og bygnaður (+ okkurt óvæntað)**

Gerið stuttan samandrátt av leikinum og gevið hvørjum parti eina yvirskrift. Grundgevið við dømum fyri valdu yvirskriftunum. Greinið síðani bygnaðin í leikinum og setið hann í frásagnarfrymilin. Veljið eitt stutt brot at greina nágreiniliga og vísið á frásøguhugtøk.

**Uppgáva 2) Nora (+ okkurt óvæntað)**

Gerið eina fullfíggjaða persónslýsing av Noru. Lýsið m.a. hvussu hon broytist, sum leikurin gongur, og hvussu hon er, tá honum er saman við ymsu persónunum í leikinum. Lýsið eisini, hvønn hugburð hon hevur til hinar persónarnar í leikinum, og hvønn hugburð hinir persónarnir hava til hennara. Grundgevið við dømum og sitatum.

**Uppgáva 3) Tarantellan (+okkurt óvæntað)**

Lýsið, hvat ein tarantella er, og hvussu tarantellan verður brúkt í leikinum. Hvønn myndamálsligan týdning hevur hon? Og hvørjar leiklutir hava ymsu persónarnir í leikinum í tarantelluni hjá Noru? Grundgevið við dømum og sitatum.

© Nám 2023

**Uppgáva 4) Frú Line og Krogstad (+ okkurt óvæntað)**

Lýsið Frú Linde og Krogstad. Hvør er teirra samfelagsstøða? Og hvussu nýta tey íkomnu støðuna til egnan fyrimun? Hvønn hugburð hava tey til hinar persónarnar, og hvønn hugburð hava hinir persónarnir til tey? Grundgevið við dømum og sitatum.

**Uppgáva 5) Helmer og Rank (+ okkurt óvæntað)**

Lýsið Helmer og Rank. Hvør er teirra samfelagsstøða? Hvønn hugburð hava teir til hinar persónarnar, og hvønn hugburð hava hinir persónarnir til teir? Grundgevið við dømum og sitatum.

**Uppgáva 6) Heitið og endin (+ okkurt óvæntað)**

Hvussu sæst heitið *Eitt dukkuheim* aftur í leikinum? Lýsið endan á leikinum (s. 94-109) Hvat hendir við dukkuheiminum? Grundgevið við dømum og sitatum. Hvørja ávirkan fær avgerðin hjá Noru á hana sjálva, Helmer og børnini? Skrivið eina stutta lýsing av Noru og Helmer fimm ár seinni.

---

**AFTANÁ (1. blokkur)**

**Uppgáva 1) Demokratia og Javnstøðunevndin**

Bólka- ella floksuppgáva.

Kannið heimasíðurnar hjá Demokratia og Javnstøðunevndini. Hvat er endamálið við hesum nevndum? Hvørjum arbeiða tey mest við í dag? Samanber javnstøðuna millum kynini í leikinum *Eitt dukkuheim* (1879) við javnstøðuspurningar í dag. Hvussu langt eru vit komin?

**Uppgáva 2) *Skam* og *Eitt dukkuheim***

Bólka- ella floksuppgáva.

Hyggið eftir einum parti (S2:E12) í norsku røðini *Skam*. Samanberið støðuna, sum Noora í *Skam* er komin í, við støðuna hjá Noru í leikinum *Eitt dukkuheim*.

**Uppgáva 3) Próvtøkulíknandi skrivlig uppgáva**

Einsæris heimauppgáva.

Greina og tulka ritroyndina *Sítt egna rúm* (brot) (1929) eftir Virginiu Woolf. Tú skalt m.a. greiða frá sjónarmiðum og greina samskifti og grundgevingar.

Samanber við leikin *Eitt dukkuheim* og hugleið um kvinnurættindi nú og tá.

---

© Nám 2023